# Kapping millum sangskrivarar



Norðurlandahúsið var í gjár karmur um sangkappingina hjá AME, har Sigvør Laksá, umboðskvinna, tók ímóti vinninginum fyri Eivør Pálsdóttir, ið er stødd í Keypmannahavn

Mynd: Jens Kristian Vang

**Bæði veðrið og lagið var gott, tá ið Jensina Olsen, ið vann Singer Songwriter- kappingina 2006, byrjaði tiltakið uppi í Norðurlandahúsinum í gjár. Heili 124 løg vórðu send inn av 70 ymiskum sangskrivarum**

TÓNLEIKUR

*Bjørk Maria Krog Olsen, praktikantur*
*redaktion@sosialurin.fo*

Í gjár var greitt, at Eivør, við lagnum »Grát ei«, hevði vunnið tær 75.000 krónurnar í AME sangskrivarakappingini. Væl umtókta songkvinnan rópti av gleði og bilsni í telefonini heilt úr Danmark, tá ið Sigvør Laksá, umboðskvinna, ringdi, aftan á tey stóru boðini vórðu kunngjørd beinleiðis í útvarpinum.

- Eg hevði ikki vantað tað.Lagið er sera gott, men tað er heilt avgjørt ikki tað einasta góða í millum tey 21 løgini, sigur Sigvør Laksá.

Eivør og Sigvør eru báðar samdar um, at hetta er eitt avbera gott tiltak. Lítil marknaður er fyri tónleikavinnuna í Føroyum, so hetta tiltakið gevur bæði kendum og ókendum føroyskum tónleikarum ein møguleika at koma fram. Ikki bara í Føroyum, men eisini í útlondum.

Jógvan á Lakjuni, ið sjálvur hevur skrivað fleiri føroysk løg, dámdi sera væl at fáa ein kvinnuligan vinnara.

– Tað er stuttligt at síggja, at kvinnurnar eisini er vorðnar serstakiliga sjónligar og virknar innan tónleikin. Í hesi sangskrivarakappingini eru átta av teimum sangunum, ið eru komnir víðari, skrivaðir av kvinnum.

2. plássið og tær 20.000 krónurnar fóru til Jens L. Thomsen og fleiri, við lagnum »Fjøllini standa úti«. Foreldrini vóru í hansara stað og tóku í móti virðislønini.

3. pláss og 5.000 krónur fóru til Boys in a Band við lagnum »Secrets to conceal«

Vinningurin í sangskrivarakappingini var upprunaliga 50.000 kr. at brúka til eina tónleikaframleiðslu, men Mentamálaráðið játtaði at lata aðrar 50.000 kr. Tí varð avgjørt at lata vinnaranum 75.000 kr., nummar tvey 20.000 kr. og nummar trý 5.000 kr. Peningurin er oyramerktur til eina tónleikaframleiðslu. sum til dømis fløguupptøku ella sjónbandalag.

Ikki bara Norðurlandahúsið hevði eitt tónlistarligt tiltak í gjár. Eisini hevði útvarpið ein »Spæl føroyskt dag«. Bert føroyskur tónleikur varð spældur í útvarpinum í gjár, og AME endakappingin varð send beinleiðis. Hetta fall í góða jørð hjá Jógvani á Lakjuni, og hann fjaldi tað ikki í røðu síni.

- Eg havi altíð hildið, at vit eiga at gera meira burtur úr tí fjølbroytta føroyska tónleikinum, og vónandi verður hetta ein afturvendandi táttur og birtir undir eina tilgongd, har vit geva okkara tónleiki størri gætur og virðing, tí tað er avgjørt ein týdningarmikil liður í menningini av tónleikinum, at hann fær innivist í okkara miðlum.

Tey 21 útvaldu løgini, ið ein føroysk dómsnevnd hevði valt burtur úr teimum 124 løgunum, sum komu inn, eru skrivaði av bæði kendum og minni kendum nøvnum á føroyska tónleikapallinum. Dómsnevndin hevur sjálvandi lurtað eftir øllum 124 løgunum. Hvør í sínum lagi hava tey valt 20 løgini, sum tey persónliga halda eiga at koma víðari. Seinastu vikurnar hevur ein dómsnevnd av útlendingum lurtað eftir teimum 21 tilnevndu løgunum og síðani atkvøtt um, hvat lag skal vinna stóra heiðurin. Dómsnevndin er mannað av nógvum ymiskum fólkum, ið virka innan tónleikaídnaðin.

Hugskotið til hesa kapping fekk Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum, aftan á at tað varð avgjørt, at Prix Føroyar ikki fór at halda fram.

## Tey 21 útvaldu løgini:

Arons Song - Hans Olivur Joensen
Aware of it - Brandur Enni, Lars Kilmann Jansson
Big Shot - Brandur Jacobsen
Dadadie - Búi E Dam
Drain me - Rannvá Jacobsen og Angu Motzfeldt
Dýrdarkvøld - Kári Sverrisson
Fjøllini standa úti - Jens L. Thomsen og fleiri
Grát ei - Eivør Pálsdóttir (vinnari)
Kynda Bál - Jensina Olsen
Love is dead - Guðrið Hansen
Mary - Ronni Poulsen
Mín varði - Elin Heinesen
Møttust vit á Penny Lane - Heri Nolsøe
Out on the Road - Trygvi D. Strøm og Kristina renfro
Secrets to conceal - Boys in a Band
Silvurfuglur - Finnbjørn Hansen og KIM Hansen og Jóanes Hansen
So called paradise - Sigrið Rasmussen (Lloyd Garret)
The Cute Little Club - Petur Háberg
Til ein vin - Margreta á Rógvu
Wasted - Lena Anderssen, Bárður Háberg Óli Jógvansson
You got a hero in me - Árni Øregaard

**Føroysku dómararnir vóru:**
Niels Halm, Hergeir Eldevig, Anna Katrina Petersen, Kaj Johannesen, Jón Tyril, Sólvá Ford, Gissur Patursson, Píl Reinert, Linda Petersen, Steintór Rasmussen, Høgni Zachariasen og Elin Hentze



*Landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, var hjástaddur í Norðurlandahúsinum í gjár.*

*mynd: Jens K. Vang*

